gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Ongar alternativar íbúðarmøguleikar á hesum sinni

**– Hóast uppskotið um at skapa fortreytir fyri alternativum íbúðarmøguleikum varð felt, ásanna tingfólk, at ein tørvur er á øðrum bústaðarloysnum. Uppskotið hevur varpað ljós á málið, so eg ætli mær ikki at helma í, men komi við einum nýggjum uppskoti seinni, sigur Heðin Mortensen, tingmaður**

BÚSTAÐARMØGULEIKAR
*Turið Kjølbro*

Tingfólk ásanna, at íbúðarmøguleikarnir í Føroyum eru ikki nóg fjøltáttaðir, men hava kortini ikki í hyggju at gera nakað við málið. Í seinastu viku feldi løgtingið uppskot til samtyktar um alternativar íbúðarmøguleikar, sum Heðin Mortensen, løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin legði fram. Í uppskotinum heitti hann á landsstýrið um at leggja fyri løgtingið lógaruppskot, sum skapar fyritreytir fyri alternativum íbúðarmøguleikum. Her verður hugsað um lutaíbúðir, leiguíbúðir, íbúðir til eldri og brekað, sum til dømis sjálvsognarstovnar reka. Við øðrum orðum íbúðir til ein og hvønn tørv uttan mun til aldur, inntøku ella førleika.

Uppskotsstillarin heldur, at føroyski bústaðarmarknaðurin er fastlæstur. Tað vanligasta í Føroyum er framvegis at ogna sær eitt grundstykki og byggja eini stór sethús við kjallara. Men tað eru ung og eldri, sum ynskja sær aðrar bústaðarloysnir.

– Øll ynskja ikki at sita í einum stórum húsum og gjalda til tey alt lívið, men sum er hava tey lítlar og ongar møguleikar fyri øðrum. Ei heldur ynskja tey at seta seg í eina nýggja stóra skuld bara fyri at flyta í okkurt annað. Eg eftirlýsi ein skipaðan politikk á bústaðarøkinum, har landið stingur út í kortið, hvat vit vilja og skapar fortreytir hareftir, sigur Heðin Mortensen.



*– Støðan bara versnar og verður einki gjørt fara fólk at leiga hvørt kamar og hvønn krók út. Tað kunnu vit ikki bjóða okkara borgarum, sigur Heðin Mortensen*

### Varpar ljós á

Undir viðgerðini av uppskotinum í tinginum sást, at tingfólk ikki tóku málið í serlum álvara. Funnist varð at tí fyri at vera ov lítið ítøkiligt, óneyvt orðað og at tað tessvegna ikki leggur nóg stórt trýst á landsstýrið.

Tað hildu eisini bæði meirilutin og minnilutin í Trivnaðarnevndini. Minnilutin mælti kortini til at samtykkja uppskotið fyri at staðfesta, at vit í Føroyum ikki hava ein skipaðan íbúðarpolitikk, sum veitir fólki valmøguleikar og í ávísum førum ongar møguleikar útvegar yvirhøvur fyri at tryggja fólki tak yvir høvdið. Hóast meirilutin í Trivnaðarnevndini ásannar, at íbúðarmynstrið í Føroyum ikki er nøktandi, metir nevndin, at ætlanir um alternativar íbúðarmøguleikar er eitt ógvuliga fevnandi politiskt tiltak, og at fyrireikingarnar av einum alternativum íbúðarpolitikki eigur at vera ein náttúrligur partur av samgongusamstarvinum hjá øllum samgongum.

Hóast uppskotið varð felt, ætlar uppskotsstillarin seinni í ár at leggja nýtt uppskot fyri tingið, sum skapar fortreytir fyri alternativum íbúðarmøguleikum.

– Hóast uppskotið varð felt, ásanna tingfólk, at ein tørvur er á alternativum íbúðarmøguleikum, og uppskotið hevur varpað ljós á málið. So eg ætli mær ikki at helma í, men komi við einum ítøkiligum og væl útgreinaðum uppskoti, hóast landsstýrismaðurin átti at tikið tað til sín og arbeitt við tí sjálvur, sigur Heðin Mortensen.

### Aftur í trýssini

Eingin kanning er gjørd, men vit vita, at tørvurin á alternativum íbúðarmøguleikum er ovurhonds stórur. Og verður einki gjørt fyri at útvega fleiri bústaðir í høvuðsstaðnum eitt nú, koma vit aftur í støðuna, sum var trýssunum.

– Støðan bara versnar og verður einki gjørt fara fólk at leiga hvørt kamar og hvønn krók út. Tað kunnu vit ikki bjóða okkara borgarum. Hóast tað er ein kommunal uppgáva at útvega borgarum bústaðir, eiga landspolitikararnir at seta út í kortið, hvørjir møguleikar eru. Tað gagnar eisini føroyska búskapinum at fáa alternativar møguleikar, soleiðis at øll ikki byggja sær eini stór sethús, sigur Heðin Mortensen.

Í almanna- og heilsumálastýrinum hava tey í fleiri ár arbeitt við at broyta viðtøkurnar fyri Húsalánsgrunnin soleiðis at tað verður léttari og einfaldari hjá tí almenna og kommunum at kunna fara undir alternativa íbúðarbygging. Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum hevur í hesum sambandi sagt, at arbeitt verður við málinum framvegis.

# Bíðilistin á heimasíðuna

**Leivur Hansen, býráðslimur í Havn, tekur nú Foreldrafelagið upp á orðið. Hann skjýtir upp, at stig alt fyri eitt verða tikin til, at bíðilistin fær innivist á heimasíðu kommununnar**

BÍÐILISTI
*Turið Kjølbro*



*Leivur Hansen, býráðslimur í Havn, gongur inn fyri størri opinleika, tá ið tað snýr seg um listan yvir børn, sum bíða eftir stovnsplássi í kommununi*

Felagið fyri foreldur at smábørnum í Havn hevur nú um dagarnar aftur hvassliga gjørt vart við vantandi kunningina frá Tórshavnar býráð, tá ið tað snýr seg um listan yvir børn, sum bíða eftir stovnsplássi og hvussu mannagongdin er, tá ið børn verður tikin inn á stovn. Felagið krevur størri opinleika og innlit, og at upplýsingar, sum eru viðkomandi fyri foreldrini, verða tøkir. Felagið heldur, at ein skipan eigur at verða gjørd, so at til ber hjá øllum, til eina og hvørja tíð, at fáa innlit í bíðilistan, bæði fyri at síggja, hvat nummar á bíðilistanum ein er, og fyri at fáa innlit í lutingina av stovnsplássum í økinum.

Leivur Hansen, limur í Tórshavnar býráð, tekur nú Foreldrafelagið upp á orðið. Hann skjýtir upp, at stig alt fyri eitt verða tikin til, at bíðilistin fær innivist á heimasíðu kommununnar. Á henda hátt fáa øll eina skjóta og lætta atgongd til bíðilistan, har til ber at síggja, hvat nummar á bíðilistanum ein er, og hvussu býtið av stovnsplássum annars er í teimum ymsu økjunum í kommununi.



Málið kemur fyri á fyrst komandi býráðsfundi.

gult7 cyan7 magenta7 svart7



**POLITIKKUR & SAMFELAG**

# Karensdagarnir vorðnir søga

**Tímalønt fara nú at fáa sjúkradagpening frá fyrsta sjúkradegi, eins og tey alment løntu. Full semja er í løgtinginum um nýggja dagpeningalóg, sum verður endaliga viðgjørd í tinginum**

DAGPENINGUR
*John Johannessen*

Nú fáa tímalønt, sjómenn og sjálvstøðu vinnurekandi javnbjóðis rættindi við tey alment løntu á arbeiðsmarknaðinum.

Løgtingið er samt um at samtykkja nýggja dagpeningalóg, tryggjar tímaløntum og øðrum verkafólki sjúkradagpening frá fyrsta sjúkradegi.

Skipanin higartil hevur innihildið tveir karensdagar, soleiðis at hesir samfelagsbólkar ikki hava fingið sjúkradagpening fyrsta og næsta sjúkradagin í eini sjúkralegu. Haraftur-ímóti hava alment lønt síðani í fjør fingið løn frá fyrsta sjúkradegi.

Sum partur av búskapartiltøkunum í kreppuárunum, vórðu tveir karensdagar álagdir teimum alment løntu, soleiðis at tey ikki fingu pening fyrr enn eftir næsta sjúkradagin. Men hendan skipan varð avtikin fyri góðum ári síðani. Korini hjá teimum, sum ikki hava verið alment lønt, hava kortini verið tveir karensdagar síðani 1979.

### Fleiri fyrimunir

Endaliga uppskotið um dagpeningaskipan, sum trivnaðarnevndin hjá løgtinginum er komin ásamt um, gevur teimum tímaløntu fleiri fyrimunir, samanborið við galdandi dagpeningaskipan.

Umframt, at karensdagarnir eru burtur í nýggju skipanini, eru dagpeningatíðarskeiðið eisini broytt, soleiðis at til ber at fáa dagpening í einum tíðarskeiðið á 40 vikur innan fyri eitt ár. Áður hevur verið møguligt at fáa dagpening í einum tíðarskeiðið á 20 vikur innan fyri eitt hálv ár.

Afturat hesum er fráboðanarfreistin longd til 30 dagar, soleiðis at tað ber til at fáa dagpening, hóast tú ikki minnist til at boða myndugleikunum frá, at tú ert sjúkur beinan vegin. Áður hevur fráboðanarskyldan verið 11 dagar. Hetta hevur ført við sær, at fleiri ikki hava fingið dagpening, tí tey hava verið ov sein av boða frá.

### Útgjaldið er ikki vaksið

Hóast fleiri fyrimunir eru við nýggju dagpeningaskipanini, er endurgjaldið til einstaka borgaran í reiðum peningi ikki vaksið.

Arbeiðir tú sum handverkari og fær fulla handverkaraløn, fær tú ikki meira enn 80 prosent av einari vanligari arbeiðsmannaløn, gerst tú sjúkur. Tað vil siga, at hóast dagpeningaskipanina, fellur inntøkan munandi, ert tú tímaløntur ella arbeiðir í privata vinnulívinum og gerst sjúkur.

# Bjarni stovnar klekingardepil



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum, fer nú at taka ítøklig stig til at seta á stovn klekingardeplar fyri menning av hátøkniligari kunningartøkni í Føroyum*

**Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur tikið ítøkilig stig eina roynda-verkætlan við kunningartøknilig um klekingardepli**

KT
*John Johannessen*

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, fer á tíðindafundi í Tinganesi í dag at greiða frá nýggjari verkætlan um klekingardeplar fyri kunningartøkni.

Hendan royndaverkætlanin er ein avleiðing av almennu ferðini hjá Bjarna Djurholm í Ísrael herfyri, har hann millum annað kunnaði seg um ísraelskar klekingardeplar fyri kunningartøkni.

Landsstýrismaðurin sigur, at endamálið við klekingardeplinum er at skapa serligar karmar fyri menning av nýggju KT-fyritøkum við at geva teimum virkisligar karmar og lætta teimum um atgongdina til fígging og ráðgeving í byrjunartíðini.

Fyrsti klekingardepilin verður ein royndarverkætlan, sum regluliga skal eftirmetast, so at funnið verður fram til, hvussu klekingardeplar á bestan hátt verða skipaðir, soleiðis at íverksetarar, íleggjarar og onnur verða stimbrað og eggjað til virkisfýsni.

– Metast skal um, hvørt vinnan til dømis saman við almennari luttøku kann standa fyri deplum kring um í Føroyum, eisini innan áðrar hátøknivinnugreinir, so sum fiskivinnutøkni, biotøkni við meira. Tað vil siga, at lokalir myndugleikar, vinnulívsfólk á staðnum, útlendskir íleggjarar og Vinnumálastýrið samstarva um menning av hátøkniligum klekingardeplum í Føroyum, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum í tíðindaskrivi.

# Dagpeningurin var tungur burður

**Tað hevur verið ein tungur burður at sleppa av við karensdagarnar hjá teimum tímaløntu. Efir viðgerð í nærum trý ár, verður nýggj dagpeningarskipan í dag samtykt**

DAGPENINGUR
*John Johannessen*

*Hóast fleiri fyrimunir hevur nýggja dagpeningaskipanin kortini tann vansan, at útgjaldið úr henni ikki fer upp um 80 prosent av einari vanligari arbeiðsmannaløn. Tað merkir, at ein handverkari fer niður í løn, gerst hann sjúkur*



Hóast allir partar hava sagt seg vilja virkað fyri javnbjóðis rættindum, hevur tað tikið drúgva tíð at beina fyri karensdøgunum hjá teimum, ið ikki eru alment lønt.

Longu fyrsta árið í hesum samgonguskeiðnum kom fyrsta uppskotið um at beina burtur karensdagarnar. Hetta uppskotið kom frá anstøðutingmanninum, Jenisi av Rana úr Miðflokkinum, í november 1998, sum var fyrsta samgonguárið hjá sitandi samgongu. Um somu tíð setti Almanna- og Heilsustýrið ein bólk, ið skuldi gera álit um nýggja dagpeningalóg.

Fyri ári síðani hendi tað so, at karensdagarnir hjá teimum alment løntu vórðu avtiknir. Hetta fekk Hans Paula Strøm úr Javnaðarflokkinum til at heita á løgtingið um at beina burtur karensdagarnar hjá tímaløntum við teirri grundgeving, at ójavni nú var staðfestur við lóg millum alment lønt og tímalønt. Hesum tóku Sambandsflokkurin og Miðflokkurin undir við, men samgongan vildi bíða eftir álitinum frá arbeiðsbólkinum.

Eftir drúgva viðgerð og nógv togtogarí um, hvørt arbeiðsgevarin ella tað almenna skuldu gjalda fyrsta sjúkradagin, kom álit frá arbeiðsbólkinum í februar í fjør. í álitinum mælti arbeiðsbólkurin til ein karensdag. Hetta var orsakað av, at semja ikki kundi finnast um, hvør skuldi gjalda fyri fyrsta sjúkradagin.

Um miðjan januar í ár kom umsíðir uppskot frá táverandi landsstýriskvinnuni í almanna- og heilsumálum, Helenu Dam á Neystabø. Tað er hetta uppskotið við broytingum, sum í dag fer at verða samtykt í løgtinginum nærum trý ár eftir, at málið varð reist.